# Danmark tekur ikki málsøki aftur

**Tað kemur neyvan uppá tal, at danir yvirtaka málsøki aftur, sum føroyingar longu hava yvirtikið, men vilja sleppa av við aftur av fíggjarligum ella øðrum ávum. - Tað havi eg ilt við at ímynda mær, sigur Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri**

UMVENDAR YVIRTØKUR
*Magnus Dam*
*Keypmannahavn*

Um onkrir politikarar í Føroyum ganga við einum tanka ella ynski um at hækka blokkstuðulin aftur næsta ár, og lata danir taka aftur yvirtikin málsøki, so kunnu teir helst jarða hendan tankan.

Tað kemur neyvan uppá tal, segði danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, tá hann mikudagin svaraði einum fyrispurningi frá Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmanni. Danir hava ongan áhuga í at yvirtaka málsøki, sum longu eru farin á føroyskar hendur.

Blokkstuðulin er gjald fyri málsøki, sum eru felags. Tá ið føroyingar yvirtaka hesi málsøki, so yvirtaka føroyingar eisini útreiðslurnar í sambandi við yvirtiknu málsøkini, og blokkstuðulin verður lækkaður tilsvarandi, vísti Anders Fogh Rasmussen á.

Tórbjørn Jacobsen vildi hava forsætisráðharran at greiða frá, um tað letur seg gera at hækka blokkstuðulin aftur, um eitt tílíkt ynski kemur úr Føroyum, og um ein fortreyt fyri at hækka blokkin aftur er, at danir yvirtaka málsøki, sum longu eru farin á føroyskar hendur.



– *Blokkstuðulin er gjald fyri málsøki, sum eru felags. Tá ið føroyingar yvirtaka hesi málsøki, so yvirtaka føroyingar eisini útreiðslurnar í sambandi við yvirtiknu málsøkini, og blokkstuðulin verður lækkaður tilsvarandi, vísti Anders Fogh Rasmussen á í svarinum til Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmann*

### Ikki hent áður

Forsætisráðharrin hevur tó ilt við at ímynda sær, at ein tílík støða fer at taka seg upp. Í øllum førum er tað ikki hent fyrr, at danir hava tikið aftur málsøki, so vítt forsætisráðharrin veit. Og somuleiðis heldur hann tað vera rættiliga óhugsandi, at blokkurin hækkar aftur. Men heilt útiloka tí, vildi forsætisráðharrin tó ikki.

Blokkstuðulin verður ásettur í samráðingum millum stjórnina og landsstýrið, og eingin veit, hvat kann henda í hesum samráðingunum, sum verða aftur í heyst um blokkstuðulin fyri næsta ár.

- Danska stjórnin hevur ikki ta arrogantu støðuna, at hon frammanundan vísir aftur at samráðast við landsstýrið, segði forsætisráðharrin.

- Men tað hevði verið rættiliga óvanligt at vent aftur og hækka ein blokkstuðul, sum áður er lækkaður, tí uppgávur eru fluttar frá at vera felags til at vera føroyskar burturav. Í øllum førum skulu føroyingar koma við rættiliga sannførandi sjónarmiðum, um teir ynskja blokkstuðulin hækkaðan aftur, legði forsætisráðharrin aftur.

Spurdur, hvørji sjónarmið kunnu hugsast at vera nóg sannførandi, segði forsætisráðharrin, at hann av góðum grundum ikki vildi koma við nøkrum boði uppá hetta.

Sostatt kann staðfestast, at eitt komandi landsstýrið neyvan fer at koma langt við einum møguligum fyrispurningi til stjórnina um at hækka blokkin aftur. Heldur ikki, um landsstýrið heitir á stjórnina um at taka aftur málsøki, sum eru farin á føroyskar hendur.

Blokkurin er í ár 615,5 milliónir krónur, og tær 366,4 milliónirnar, sum hann minkaði við í mun til í fjør, fáast neyvan aftur.

# Á seiðabergi í góðveðrinum




*Í góðveðrinum, 13. mars, stóðu hesir á seiðabergi beint aftanfyri hekkuna á Lómi*

*Vilmund Jacobsen*

Enn eru vit ikki komin longur enn út í hálvan mars, og enn kunnu vit vænta okkum bæði kulda, kava og skiftandi veður.

Grækarismessudagur var ikki so góður, sum dagurin eftir, ið gjørdist ein rættiligur várdagur við nógvari sól.

Tá ið Sosialurin í góðveðrinum fór oman á molan í Saltangará at taka myndir av Akrabergi, sum lá og tók proviant til komandi túr, sóu vit hesar dreingirnar standa beint aftanfyri hekkuna á Lómi og stuttleika sær við sleingitráðu.

Nógvur seiður stóð beint undir vatnsskorpuni, og teir siftu, sum teir vildu. Teir høvdu gággu til agn.

Á innaru síðu á molanum stóð eisini nógvur seiður. So, her hevði verið gott pláss, um fleiri vildu staðið við tráðuni.

### Seiðapláss

Í fleiri bygdum kring landið eru gomul seiðapláss, og tey hava nøvn, sum røkka langt aftur í tíðina. Men millum yngra ættarliðið munnu hesi staðarnøvn fara at kámast, so hvørt tey ungu hava onnur áhugamál og ganga minni og minni á tey gomlu seiðaplássini.

Ert tú úti á bygd, sært tú ofta, at bæði børn, ung og vaksin framvegis ganga á seiðaberg, men nú standa hesi oftast á molanum og ikki á gomlu seiðaplássunum, har streymaseiður er at fáa.

Hví seiðaplássini liggja júst, har tey liggja, er tengt at nátturuviðurskiftunum. Nógvastaðn fram við fjøruni er nógvur tari, og tí ber ikki til at fiska hvar sum helst.

So, tey gomul seiðaplássini eru útvald støð - vald út av teimum gomlu, sum kendu fjøruna og taran, sum sín egna lumma.

# hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 15. mars til hósdagin 21. mars

## »Eg noyðist at lurta«




*Gerandisdagurin hjá Charles Gade er sum hjá fólkum flest, hóast nólsoyingurin er sjónveikur. Hann ferðast ofta við Rituni til Havnar at røkja sítt arbeiðið sum klaverstemmari. Hann fæst eisini við at skriva tónleik, og tónleikur eftir hann er javnan at hoyra í útvarpinum. Ein kann siga, at brekið hevur ikki darvað Charles Gade, og hevur heldur ikki frátikið honum hugin at royna nýggjar avbjóðingar. Herfyri luttók hann í eini skjótikapping í Danmark, har hann fekk góð úrslit.*

## Tað ljósa várið



*Lydia Didriksen ummælir:*

Jú, so fór grækarismessan, og dagarnir eru vorðnir longri, og eg havi hoyrt onkran sagt seg hava hoyrt okkurt klipp, uttan tó at hava sæð nakað tjaldur. Vár? Tað er í hvussu so er á veg!

Sjónvarpið hevur tikið ein nýggjan tátt upp. Tvey tey seinastu mánakvøldini hevur Okkara millum við Katrini Petersen verið á skránni eftir Dag og viku. Tann fyrra sendingin snúði seg um fólkaskúlan og dúgliga var kjakast um hesa sendingina aftaná. Fólk vóru ósamd um dygdina, men øll vóru samd um, at evnið var viðkomandi, hóast sendingin var alt ov stutt (og tí eisini ov grunn!) til eitt so umfatandi evni. Hví ikki gera eitt temakvøld um føroyska skúlan, har øll eru umboðað, sum hava við fólkaskúlan at gera? Næmingar, foreldur, lærarar, stjórar, avvarðandi myndugleikar og politikkarar? Tað hevði verið áhugavert!!

Seinna sendingin um rætta aldurin at fáa sær børn hepnaðist betur! Sendingin var væl sett saman við brotum úr teldubrøvum, telefonpráti og samrøðum í sjónvarpsstovuni. Eisini var tað ein sending, sum livdi longri enn teir minuttirnar, hon vardi!

Og eitt annað, sum gevur júst hesi sendingini eitt pluss! Hyggjarin fær at vita frammanundan, hvat sendingin fer at snúgva seg um! Tað hendir ikki á hvørjum degi, tíverri!

Og so hevur útvarpið gjørt tað bragd at fara undir at senda nýggja føroyska skaldsøgu eftir Oddvør Johansen. Tað rokni eg við, at fleiri fegnast um saman við mær. Útvarpið tykist at hava ein serligan tokka til eldri tilfar – tað tykist, sum teir siga: Jú eldri, jú betri! Gud viti hví?! So kanska várið eisini er á veg niðan í Sortudíki!

Tað er so ikki bara grækarismessan, sum er farin aftur um bak í hesum umfarinum – tað er sanniliga eisini 8. mars – altjóða kvinnudagurin, um onkur er, sum ikki kennist við dagin! Og fyri fyrstu ferð vórðu fløggini vundin í húnar hátt henda dagin! Og ikki bara tað! Í Norðurlandahúsinum var serligur fundur hildin, har tey kvinnuligu umboðini fyri teir ymisku politisku flokkarnar løgdu síni sjónarmið fram. Fitt av fólki var samankomið at lýða á, teirra millum eisini nakrir menn.

Einki sjónvarp var á fundinum, men útvarpið tók tráðin upp frá fundinum í sending týskvøldið, sum Bjørt Samuelsen stóð fyri. Sera áhugaverd sending skal sigast! Hesar kvinnurnar hava síni hjartamál, sum tær vilja hava framd! Eftir er bara at vóna, at tær, tá ið valstríðið byrjar av álvara, vera annað enn pyntudukkur á listunum. Tað er so hugstoytandi og flokkunum til lítlan sóma, at einans menninir síggjast og hoyrast í loftmiðlunum, tá ið flokkarnir spíla seg út fyri at tekkjast veljarunum í endabrestinum – tað avdúkar eina ódámliga raðfesting!

Kanska tað verður øðrvísi hesuferð, nú lýggir várvindar nærkast oyggjunum!

## Fres – Veðurstøðin




## Lat nú føstuklokku ringja




## Sammenhold




## UEFA Champions League

